**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning nr. 91/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, um Eysturoyartunnilin**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landstýrismaðurin upplýsa, hvørjar atknýttar verkætlanir skulu gerast til Eysturoyartunnilin og kostnaðin av hesum?

2. Hvat boð hevur Fíggjarmálaráðið til rentukostnað av komandi undirsjóvartunlunum?

***Svar:***

**Til nr. 1**

P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar hava ábyrgd av at knýta Eysturoyartunnilin í verandi landsvegakerv. Sum útgangsstøði eru ongar atknýttar verkætlanir til Eysturoyartunnilin. Hinvegin hevur samgongan sett 1,3 milliardir krónur á sína langtíðarløguætlan fram til 2024 til nýggjar landsvegir o.a. Summar av hesum verkætlanunum eru í ávísan mun knýttar at Eysturoyartunlinum og tí broyting í ferðslumynstri, sum roknast kann við verður av tunlinum.

Víst verður annars til samferðsluætlanina hjá Landsverki, sum hevur fleiri hugskot og ætlanir um nýggjar vegir, sum hava ávirkan á komandi Eysturoyartunnil.

**Til nr. 2**

Í løtuni ber ikki til at meta um rentukostnaðin av undirsjóvartunlunum, av tí at realitetssamráðingar hava ikki verið millum felagið P/f Eysturoyar- og Sandoyartunlar og áhugaðar fíggjarstovnar. Men ábendingar eru um, at felagið kann fáa fígging til lagaligar treytir, harundir rentutreytir. Metingar um rentukostnað eru óbroyttar sammett við støðuna, tá ið felagið P/f Eysturoyar- og Sandoyartunlar varð stovnað.

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður